# Porsche 911 í 40 ár

**Í ár eru liðin 40 ár síðan Porche 911 kom á marknaðin. Bilurin varð fyrstu ferð sýndur fram á Frankfurt bilaframsýningini í 1963. Ongin roknaði við bilurin skuldi verða so leingi á marknaðinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*


*Porsche 911, sum kom á marknaðin í 1963, avloysti Porsche 356 eftir at hann hevði verið á marknaðinum í 15 ár*

## Porsche 911 Turbo

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 3,6 litur 6.syl boxermotor 420 hk |
| 0-100 km/t: | 4,2 sek |
| Bensinnýtsla: | 7,8 km/l |
| Dekkstødd: | 225/40-18 |
| | 295/30-18 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 444,0 cm |
| Breidd: | 183,0 cm |
| Hædd: | 130,0 cm |
| Eginvekt: | 1400 kg |
| Prísur (í Danmark): | kr. 2.793.837,- |

Ferdinand Porsche (1875-1952) má metast sum eitt av stóru nøvnunum í heimsbilasøguni. Tað var hann sum stovnaði týsku Fólkavognsverksmiðjuna, ið grundarsteinurin bleiv lagdur til 26. mai 1938, við gamla Wolfsburg slottið nærhendis í lítla býnum Fallersleben.

Upprunaliga var ætlanin at Porsche bilarnir skuldu verða sportsligar útgávur av Fólkavognunum. Tað var sonur Ferdinand Porsche, Ferry Porsche, saman við øðrum, sum stóð fyri Porsche-verkætlanini. Fyrsti Porsche bilurin, Porsche 356, bleiv fyrstu ferð sýndur fram fyri 55 árum síðan, tann 8. juni 1948. Bilurin varð á marknaðinum, til hann bleiv avloystur av Porsche 911 í 1963.

Tá Porsche 911 fyrstu ferð var sýndur fram á bilaframsýningini í Frankfurt í 1963, var navnið Porsche 901, men tað slapp bilurin ikki at eita, orsaka av at franska Peugeot bilverksmiðjan eigur einarætt til trý-sifraði tøl við null í miðjuni, so navnið mátti broytast til 911. Júst tað sama hendi í 1971, tá Mazda komu á marknaðin við 808, teir máttu broyta navnið til 818.

Tann sum designaði Porsche 911 var Ferdinand Alexander Porsche, abbasonur gamla Ferdinand Porsche. Hann bleiv seinni ein kendur designari. Eins og allir teir gomlu Fólkavognarnir, hava Porsche bilarnir eisini boxermotor aftan og bakhjólstrekk. Í dag hava teir flestu Porsche 6 syl. boxermotorar.

Porsche 911 eru sjálvandi nógv broyttur hesi 40 árini, bæði tekniskt og í útsjónd, men enn líkist bilurin sær sjálvum. Um allan heimin verður 40 ára dagurin hátíðarhildin hjá teimum ymisku Porsche søluumboðunum.

*maggi@sosialurin.fo*


*Ferry Porsche og pápin, Ferdinand Porsche, við fyrsta Porsche bilinum*


*Á hesi myndini sæst hvussu Porsche 911 er broyttir hesi 40 árini*


*Nýggjasti Porsche 911 GT2, árgang 2004, sær nakað væl frekari út enn teir fyrstu, sum komu á marknaðin fyri 40 árum síðan*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum


**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg mars '97, Km 150.000. Fjarstýrt centrallás - El.rútar - El.spegl - Spoylara aftan - Alufelgur- v.m.. Kr. 66.000.
**Tilboð uttan bil í býti kr. 56.000,-**


**TOYOTA LANDCRUISER DIESEL**
Árg maj '86, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur.. Kr. 28.000.


**FORD ESCORT 1.8 DIESEL SEDAN**
Árg okt. '95, Kr. 60.000.
**Tilboð uttan bil í býti kr. 50.000,-**


**KIA K 2700 LASTVOGNUR KING CAB 2700 DIESEL 3.200 KG**
Árg juni '01, Km 38.500. Aircondition - Centrallás - C.D.Anlegg - Sleipikrók- Differentiale sperru - eyka tectylviðgjørdur - Klæddur við plátum innv. í lastini. v.m.. Kr. 125.000.
**NÝPRÍSUR: 190.300,-**


**SUZUKI WAGON R 1.2**
Árg maj '00, Km 42.000. C.D Anlegg - El.rútar - El.spegl - Síðuspoylarar - Takspoylara - sleipikrók - píkadekk v.m.. Kr. 86.000.
**Tilboð uttan bil í býti kr. 75.000,-**


**HONDA CIVIC**
Árg sept. '01, Km 20.700. Aircondition - El.rútar - El.spegl v/hita - Radio - Fjarstýrt centrallás v.m.. Kr. 145.000.
**Sum nýggjur**


**ROVER 620 GSDI 2.0 T.DIESEL**
Árg dec. '99, Km 146.800. Leður setur - Aircondition - Fjarstýrt centrallás - El.sóltak - El.rútar - El.spegl - Alufelgur v.m. . Kr. 150.000.
**Tilboð uttan bil í býti kr. 140.000,-**

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**


**FORD FIESTA 1.8D**
Árg apr. '97, Km 128.000. Sýnaður 25.07.03.. Kr. 65.000.
**Uttan býtisbil kr. 55.000,-**


**HONDA ACCORD 1.8**
Árg apr. '98, Km 87.000. Sýnaður 06.06.02. Kr. 119.000.
**Uttan býtisbil kr. 99.000,-**


**OPEL ASTRA 1.7 TD**
Árg feb. '99, Km 69.000. Sýnaður 13.12.03. Kr. 114.000.
**Uttan býtisbil kr. 99.000,-**


**VW CARAVELLE - 10 PERS.**
Árg jan. '01, Km 68.000. .
**Uttan býtisbil kr. 259.000,-**


**TOYOTA AVENSIS 1.8**
Árg juli '99, Km 69.000. Sýnaður 08.07.02. Kr. 124.000.
**Uttan býtisbil kr. 114.000,-**


**FORD MONDEO 1.8 D**
Árg feb. '95, Km 151.000. Sýnaður 10.07.01. Kr. 69.000.
**Uttan býtisbil kr. 59.000,-**

**VOLVO S40 1.8**
Árg mei '97, Km 94.000. Sýnaður 13.03.03. Kr. 138.000.
**Uttan býtisbil kr. 128.000,-**

**FORD ESCORT 1.6**
Árg mei '96, Km 124.000. Sýnaður 14.09.01. Kr. 69.000.
**Uttan býtisbil kr. 59.000,-**


**VW GOLF 2.0**
Árg juli '02, Km 25.000. .
**Uttan Býtisbil kr. 199.000,-**


**FORD ESCORT**
Árg okt. '97, Km 102.000. Sýnaður 27.03.02. Kr. 89.000.
**Uttan býtisbil kr. 79.000,-**

VOLVO RENAULT

VR BILAR

Hoyvíksvegur
tel 322110

## 7 PERSÓNA FAMILJUBILUR


**MERCEDES BENZ 230 TE**
Árg 1991, Km 118.000. Rúmligur 7 persóna familjubilur til sølu. Bilurin er í sera góðum standi. Nýsýnaður, eyka felgur fylgja við, nýtt útstoyt (komplett), nýggjur akkumulator, nýggjar bremsuskivur framman og nýggir el-rútavindarar. Søluprísur kr. 149.000. Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 216135 . .


**MERCEDES-BENZ 190 D - 2,0 DIESEL**
Árg 1989, Km 270.000. Bilurin er í góðum standi, koyrir 15,0 km/l. Kr. 75.000.
**tel. 447175 ella 217175**


**CITROËN JUMPY 1,9 TD**
Árg 1999, Km 69.000. Sera væl hildin vøruvognur. Innrættaður til handverkara. Til sølu um hóskandi boð fæst.. kr. 120.000,-.
**Ringið tel. 371937 ella 211937**


**SKODA FABIA 5/H**
Árg mai 2003, Km 3.428. Sera væl hildin bilur til sølu, bert 3 mánaðar gamal . Kr. 110.000.
**tel. 266430**

**DØMI UM LÝSING:**


**AUDI A4 TDI**
Árg 1995, Km 135.000.
Kr. 130.000 .

Lýsið við brúktum bilum


Sosialurin

